# Brúðarmyndir



*Hjartaliga takka vit øllum tykkum, sum á ymiskan hátt gjørdu hjúnabandsdag okkara tann 7. mai 2006 so minningarríkan. Við ynskjum um eitt bjart og vælsinga nýggjár.*
***Sóleyð Ísaksdóttir Hermansen og Jan Mohr Hermansen***



*Hjartaliga takka vit øllum tykkum, sum vóru við til at gera brúdleypsdag okkara 11. august 2006 so góðan og ógloymandi. Harrin signi tykkum í nýggja árinum.*
***Dora og Niels Pauli Nónstein***


KIOSK ACTIV

## Fólk søkist

Til fast arbeiði, at byrja skjótast gjørligt.
Ring tlf. 23 37 41 ella send umsókn til

**Kiosk Activ**
**Postboks 3333**
**110 Tórshavn**



i
Sosialurin





# Vilt tú lata hurðar upp?

## Skyn søkir eftir húsameklara

Føroya Banki fer í næstum at lata upp Skyn, ið fer at handla við fastognum. Saman við leiðandi meklaranum og einum samskipara verður tú partur av einum ágrýtnum toymi, sum miðvíst arbeiðir fyri einum góðum úrsliti. Vit bjóða eitt gott fakligt arbeiðsumhvørvi við góðum møguleikum fyri persónligari menning. Skyn leggur dent á álítandi ráðgeving, trúvirði og varandi kundanøgdsemi.

Vit sóknast eftur einum persóni við húsameklaraútbúgving ella viðkomandi útbúgving ella starvsroyndum.

Arbeiðsuppgávurnar eru millum annað:

- Framsýning av ognum
- Meting av ognum
- Papírsgongd frá A–Ø
- Umsiting av heimasíðu
- Stýring av boðsrundum

Tú hevur stóran áhuga fyri sethúsum og húsamarknaðinum. Vit leggja stóran dent á, at tú ert opin og dugir væl at skapa samband við kundar okkara. Tú hevur hug at selja, ert álitisvekjandi og kanst arbeiða skiftandi tíðir.

Vilt tú hava nærri at vita um starvið, kanst tú venda tær til Torgun Davidsen, stjóra, á telefon 557400, ella senda henni eitt teldubræv á torgun.davidsen@foroyabanki.fo.

Umsóknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 19. januar 2007 kl. 12.
Send umsókn við útbúgvingarprógvi, CV og viðmælum til:

Skyn
C/o Føroya Banki
Att.: Torgun Davidsen
Postsmoga 3048
110 Tórshavn

REPROZ

Skyn

Skyn er partur av Føroya Banka